# í tjaldi á Suðurpólinum





– Hundarnir fóru eftir pingvinunum, so vit noyddust at hava teir í tjóri, sigur Julian Vágstún

og arbeiddu úti á ísinum í tríggjar vikur.

## Aftur í skúla

Tá ið skipini umsíðir aftur loystu frá ísbrúnnu, vóru meteorologarnir eftir har suðuri.

Julian sigur, at á veg heimaftur, fóru teir til Ný Foundlands at veiða kóp, og hann heldur seg minnast, at teir fingu meira enn 7.000 kópar hendan túrin.

– Vit tóku bara skinnini, og síðan fór alt hitt í havið aftur.

Julian hevði nú tjent sær so mikið av peningi, at hann kundi fara aftur í skúla.

– Eg hevði sum áður nevnt bara breiddina, og ætlaði mær at læra meira. Nú hevði eg tjent mær tann pening, mær tørvaði, og næstu 10 mánaðirnar tók eg longdina á sjómansskúla í Noregi.

## Knøini bila

Sosialurin hitti Julian Vágstún í Klaksvík mánadagin, har hann fortaldi okkum hesa søgu um ferðina á Suðurpólinum.

Julian sigldi øll síni bestu ár, og í fleiri ár var hann á brúnni sum bestimaður og skipari.

Hann er ikki ungur maður longur, og knøini eru farin at bila.

– Hetta er aðru ferð, eg havi skift knæið, seinast var fyri jól. Eg koyri á hesi tríhjólaðu súkkluni, men átti heldur at gingið meira, sigur blíði og fryntligi klaksvíkingurin, sum hevur upplivað eitt sindur av hvørjum í lívinum.



*– Eg koyri á hesi tríhjólaðu súkkluni, men átti heldur at gingið meira, sigur Julian Vágstún, sum sigldi øll síni bestu ár*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*